# Kvinnan sk

**Kvinnurnar yvirtaka alsamt meira og meira. Í skúlunum fáa genturnar toppkarakterir og fleiri kvinnur sita á hægstu størvunum kring landið. Nógv er hent í okkara vesturlendsku tankagongd, síðan slóðbrótandi kvinnur í 60'unum stóðu fram og kravdu javnrættindi millum kynini. Hóast framgongdin hevur verið stór á okkara leiðum, er søgan ein heilt onnur nógva staðni í heiminum**

## Dagsverk

**Annika Hedegaad Isfeldt**
sjálvboin á OD-høvuðsskrivstovuni í Keypmannahavn

Í vestafrikanska landinum Niger er tað, at man hevur nógvar konur, eitt tekin um, at man er vælhavandi og væl fyri í samfelagnum. At kvinnurnar ikki fara út um heimið vísir, at maðurin ikki hevur tørv á arbeiðsmegi teirra til ymiskt sum at heinta vatn úr brunninum - tað vísir umheiminum, at maðurin sjálvur megnar at forsyrja familju síni uttan hjálp frá konuni. Men kann tað í fjóðra fátækasta landi heimsins kallast kvinnuundirtrykkjan, um kvinnan ikki fer út um heimið?

Ymisku konurnar búgva í hvør sínum húsi, sova í hvør sínari song og saman gera tær alt tað húsliga arbeiðið. Út eftir sær alt idylliskt út. Tær passa arbeiðið sítt og hugna sær saman – tað sæst ikki á teimum, at arbeiðsdagur teirra er yvir 15 tímar langur.

### Kvinnan stríðist vegna siðir

- Dagurin hjá mær byrjar kl. fimm hvønn morgun, tá ið eg fari upp fyri at gera klárt til mann mín, sigur Amou Abdou.

Fyri meg er klokkan framvegis ov lítið til, at man kann kalla tað "morgun" – eygu míni berjast framvegis hart fyri at vera verandi opin. Eg hevði ongantíð sjálv funnið uppá at farið upp mitt um náttina, um tað ikki var tí, eg hevði eina avtalu við Amou. Fyri hana er hetta við at fara tíðliga upp tó ikki nakar trupulleiki – tað er rutina, ein vanasak. Hon hevur longu arbeitt í fleiri tímar við at banka hirsi til at gera hirsibollar. Hetta er eitt dagsarbeiði, tí bollarnir skulu gjøgnumarbeiðast so væl í fleiri umførum og Amou hevur av hesi orsøk ringa tíð til at tosa við meg. – Eg haldi ongantíð frí. Eg arbeiði, frá tí eg fari upp og til eg fari í song aftur. Eg má sjálvandi eisini ansa eftir manni mínum og átta børnum mínum. Tað er mítt arbeiði og tað er eitt fulltíðararbeiði. Eg geri altíð, sum maður mín biður meg, tað er mín plikt, tí vit altíð arbeiða so hart. Tó haldi eg,

tað týdningarmiklasta í einum forholdið millum menn og kvinnur er, at man deilir alt ímillum sín og respekterar hvønn annan. Soleiðis havi eg tað eisini saman við manni mínum; hann gevur mær altíð nógvar gávur, tá ið vit hava ráð til tess og hann hevur enntá eisini givið mær eitt stykki av jørð, eg sjálv kann dyrka.

Uppvaksin í einum heimi, har kvinnur í nógvum førum eru meiri succesfullar enn mannfólk og har javnrættindi eru vorðin ein náttúrligur partur av samfelagnum, tykist okkurt mær sera løgið. Hvussu kann Amou tosa um týdningin av at deila alt, tá ið hon stríðist við arbeiði sínum, meðan maður hennara bert sløvur situr og hyggur at saman við hinum monnunum á gøtuni? Kundi man ikki hugsa sær, at mennirnir kanska hjálptu konum teirra við einum parti av arbeiðinum, tá ið teir alíkavæl einki annað gera?

Amou flennir. – Jú, mítt arbeiði er heilt greitt strævnari enn arbeiði hjá manni mínum; hann heldur nógvar steðgir gjøgnum dagin. Tá ið hann er úti á markini, kann hann seta seg niður eina løtu at práta við hinar mennirnar og um døgurðatíð kemur hann heim og heldur ein langan døgurðasteðg. Tað hevði



*Amou, 40, hevur ein 15 tímar langan arbeiðsdag. Hóast hon veit, at arbeiði hennara er nógv strævnari enn arbeiði hjá manninum, klagar hon ikki - tí soleiðis eru siðirnir í Niger*





eg ongantíð kunnað gjørt, so hevði eingin verið til at tikið sær av arbeiði mínum. Eg noyðist at arbeiða sera hart fyri at fáa tað heila at koyra runt, eg havi jú eina stóra familju at forsyrgja. Men soleiðis eru siðirnir. Maður mín hevði ongantíð kunnað gjørt arbeiði mítt, tað er alt ov hart fyri hann.

### Týdningarmiklast er, at kvinnan aktar

Eftir at hava fingið eitt innlit í gerandisdagin og hugsanirnar hjá eini kvinnu, haldi eg tað vera áhugavert eisini at tosa við ein mann um hesi evni. Amou tosaði um at deila alt, so tað eru kanska bert fordómar, vit hava av monnunum í u-londunum og kynsmyndir teirra? Hevur tað nakra ávirkan á kynsbýtið, at tú livir í 4. fátækasta landi heimsins?

Tá ið eg tosi við føroysku vinmenn mínar, siga teir altíð, sum Hollywoodstjørnurnar gera í kærleiksfilmunum, at "dreymagentan skal vera fitt og festlig – og sjálvandi skal hon eisini síggja gott út". Sum 80-ára gamal og leiðari av nomadufulanibygdini Kaima, fær Souliy Amadou Garba nógva respekt frá fólki sínum. Øll lurta eftir honum, tá ið hann tosar og orð hansara eru at kalla lóg. Tá ið hann tosar um kvinnur, er tað tó ikki beinleiðis í vesturlendskum vendingum; hann umboðar eina kvinnufatan, ið hjá okkum verður sæð sum avoldað og hann hevur allarhelst ongantíð hoyrt eitt orð um kvinnufrígerðing.

- Tað er gott, um ein kvinnu er vøkur og sterk, men hevur

Sosialurin